# Tvær fráboðanir eftir lítlari løtu

**Sløkkiliðið í Havn hevði úr at gera ta einu løtuna seinnapartin leygardagin. Fyrst ljóðaði ein alarmur á Landssjúkrahúsinum og síðani varð boðað frá eldi í einum húsum í vesturbýnum**

SLØKKILIÐIÐ
*Snorri Brend*

**Havn:** Seinnapartin leygardagin boðaði ein alarmur á Landssjúkrahúsinum frá eldsbruna.

Sløkkiliðið var skjótt á staðnum, og kundu teir staðfesta, at alarmurin hevði boðað rætt frá: Inni í einum rúmi var vorðin heldur heitt og nógvur dampur, og tí sló alarmurin til sum hann skuldi.

Teir stóru brandbilarnir fóru beinanvegin av Brandstøðini við Oyggjarvegin og út á Landssjúkrahúsið, har teir so kundu staðfesta at talan ikki var um nakran álvarsligan tilburð.

Meðan teir eru í ferð við at rigga av á Landssjúkrahúsinum, kemur ein fráboðan aftrat. Hesa ferð snýr tað seg um ein eldsbruna sum var í ferð við at menna seg í einum sethúsum í vesturbýnum í Havn.

Sløkkiliðið var ikki so langt frá staðnum, og eftir 2-3 minuttum vóru teir við hesi sethúsini, og kundu her staðfesta, at eldur var komin í innanvert klædningin á skorsteininum, sum tíbetur lá uttaná húsunum.

Teir fingu skjótt bast eldinum. Men vildi illa til, hevði hesin kunnað ment seg til ein enn størri eldsbruna, ikki minst tí at vindurin var so nógvur leygardagin.



*Sløkkiliðið fekk seinnapartin leygardagin fráboðan um ein eldsbruna í einum sethúsum vesturbýnum í Havn (myndin). Men tíbetur fingu teir bast eldinum áðrenn hann rættiliga slapp at gera um seg*

# Amnesty: 600 nýggjar limir í ár

**Á Altjóða Mannarættindadegnum – av mongum nevndur Amnesty-dagurin – kann føroyska deildin staðfesta at limatalið er tvífaldað síðani í summar. Í dag er limatalið omanfyri 1200**

AMNESTY
*Snorri Brend*

At tað leygardagin var Altjóða Mannarættindadagur lat felagsskapurin sjálvandi ikki fara aftur við borðinum uttan markering.

Kl. 11 henda morgunin lat deildin upp eina kunningar- og sølubúð á torginum í SMS og í FK í Hoyvík. Her bar til hjá fólki at fáa meiri at vita um Amnesty og eisini at tekna seg sum lim.

Høvið var eisini henda dagin at vitja inn á nýggju skrivstovuna, sum føroyska deildin hevur fingið á Hoydalsvegi 6, har Skótabúðin hevur hildið til.

Føroyska deildin av Amnesty varð stovnað í 1965 og hevur tí 40 ár á baki í ár.

*Tær hava riggað kunningarborðið til á torginum í SMS, sum lat upp kl. 11 í morgun. Tann fyrsta áhugaða er longu komin at borðinum*



# 2,6 % fara til eftirlønina

Fríggjadagin skrivaðu Fíggjarmálaráðið undir nýggjan sáttmála við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna.

Talan er her ein tveyára sáttmála við einum karmi, sum er umleið 2,6%.

Feløgini og Fíggjarmálaráðið samdust um at alt skuldi fara til eftirlønina.

Eftirlønargjaldið hækkar í ár við 1% og næsta ár við 2%, og kemur tá upp í 11%.



*Samráðingarfólkini eru nú liðug við arbeiðið sítt*

## Horvni føroyingurin funnin

**Australska løgreglan fekk um vikuskiftið samband við føroyingin, sum eingin annars hevði sæð síðani mikudagin í næstseinastu viku**

HORVIN
*Snorri Brend*

**Sydney:** Mikudagin næstseinastu viku hevði hesin maðurin úr Havn innskrivað seg á flogvøllinum í australska býnum Sydney, tí hann ætlaði sær heim til Danmarkar. Kortini fór maðurin ikki við hesum flogfarinum.

Síðani tá hevur danska sendistovan verið í tøttum samstarvi við løgregluna í Australien og somuleiðis við familjuna í Føroyum um hetta málið.

Seinnapartin leygardagin fekk Sosialurin so upplýst frá vakthavandi á Polististøðini í Havn, at maðurin var komin afturíaftur.

Hann hevði sjálvur vent sær til eina lokala politistøð har niðri, varð upplýst.

Meiri vistu teir ikki at siga frá hendingini, og heldur ikki hvat var hent og hví so var, ella nær maðurin kemur aftur til Føroyar.

## Fýra tiknir við kenning

**Náttarvaktin á Politistøðini í Havn hevði eina róliga nátt fram til kl. 04 sunnumorgunin, tá vend kom í**

POLITI
*Snorri Brend*

Hóast leygarkvøldið helst var tað, har flest fólk mundu vera í einumhvørjum jólaborðhaldi, so hevði løgreglan ikki havt so nógv at gera orsakað av hesum.

Heilt friðarligt var fram til kl. 4, tá tann fyrsti bilførarin varð tikin og skuldsettur fyri at hava koyrt ávirkaður av rúsdrekka. Stutt eftir hetta vórðu tríggir bilførarar aftrat tiknir og skuldsettir fyri tað sama.

Av Politistøðini í Havn fær Sosialurin upplýst, at bilførararnir vórðu m.a. steðgaðir í Vágum og á Sundi.

Í aðrar mátar hevur verið sera friðarligt kring alt landið. Hóast nógva vindin hesa náttina varð ikki boðað frá nøkrum skaða orsakað av hesum.